

# Oljuprísurin á veg niður aftur

**Jógvan Hugo Gardar**

28.04.2015 - 08:12

Oljan.fo

Oljuprísurin, sum í gjáramorgunin var uppá tað hægsta farnu fýra mánaðirnar, fór aftur at lækka út á dagin, og lækkingin heldur á í morgun.

Wall Street Journal skrivar at oljuprísurin er hækkaður við umleið 30 prosentum, síðani hann í mars var uppá tað lægsta farnu seks árini, men blaðið vísir til greinarar sum siga at tað framvegis sær út til at vera meir olja úti á marknaðinum, enn marknaðurin klárar at svølgja. Tí rokna oljugreinarar við at prísurin kemur at lækka meir.

Mánamorgunin varðnorðsjóvaroljan Brent seld fyri 65,25 dollarar fyri fatið, samanborið við 65 dollarar seinnapartin fríggjadagin. Amerikanska lættoljan WTI kostaði mánamorgunin57 dollarar fyri fatið, samanborið við 56,60 dollarar fyri fatið fríggjdagin.

Amerikanska lættoljan WTI kostar í morgun 56,17 dollarar fyri fatið, fyri olju sum skal latast keypara í juni.

Í morgun kostar eitt fat av Brent-oljuni 64,06 dollarar fyri fatið. Tá oljumarknaðurin stongdi í Evropa ígjár var prísurin 64,61 dollarar fyri fatið. Hetta er prísur fyri olju sum skal latast keypara beinanvegin